KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting: 23.09.2021 kl. 17:30
Málnr.: 20/01212 Gerðabók
Nevndarlimir: Karl Johansen, Atli S. Justinussen, Jógvan Skorheim, Gunvá við Keldu, Oddmar á Lakjuni, Jóhanna Christiansen, Eyðstein Ó. Poulsen, Annika S. Biskopstø, Óli M. Lassen, Signhild V. Johannesen og Tummas J. Lervig
Varalimir: Sven Dahl møtti fyri Jógvan Skorheim
Ikki møtt:
Onnur: Rúni Rasmussen, kommunustjóri
Protokollførari: Jensa Anthoniussen, fulltrúi

Málsyvirlit		
Til viðgerðar		
129/21	21/01168-2	Býráðslimur forfall - Jógvan Skorheim
130/21	21/00942-17	Fíggjarætlan 2022 - Klaksvíkar Býráð - fíggjarkarmur 2022
131/21	21/00407-21	Umfígging og lántøka, 2021 - lántøka oktober 2021
132/21	21/00934-1	Reglugerð um fulltrú til kommunalar bindingar - dagføring ísv. kommunustjóraskifti
133/21	21/00348-18	Umsiting av Klaksvíkar Hermetikk (Bollafabrikkin)
134/21	18/01217-27	Stroyming av býráðsfundum - endurskoðan
135/21	20/01182-25	Broyting av byggisamtykt fyri Trøllanes
136/21	19/00950-81	Byggisamtykt fyri Svínoy - Eftir almenna hoyring
137/21	19/01422-9	Uppskot til byggisamtyktarbroyting – Økispartur C12 til A18
138/21	21/01046-1	Skúrbýur norðanfyri Valrætt
139/21	21/00624-6	Atkoma til matr.nr. 989 frá Kósabrúnni
140/21	21/01075-1	Broyting av byggisamtykt - Broyting av hæddarásetingum fyri B5, Klaksvík
141/21	21/00615-2	Viðv. sundurbýti av matr.nr. 10a á Trøllanesi
142/21	21/00937-2	Sundurbýti av matr.nr. 910 í Klaksvík
143/21	21/00909-2	Marknaumskipan - matr.nr. 1411 og 1414
144/21	21/01002-2	Umsókn um marknaumskipan og góðkenning til vegakomu - matr.nr. 582 og 579b
145/21	20/00848-24	Lendi til wc/bíðirúm/goymslurúm

146/21	21/00845-5	Viðv. keyp av meirøki afturat matr.nr. 898 við Borðoyarvík
147/21	21/00897-1	Søla av kommunalum grundøkjum
148/21	17/00642-90	Møgulig yvirtøka av Syðradalsvegnum
149/21	20/01227-24	Vetrarhaldið í 2021 - serlig avbjóðing – *eykajáttan, fyrra viðgerð*
150/21	21/00754-1	Rakstrarstaðið "Integratión" flytast frá kontubólki 1 til kontubólk 2 – *seinna viðgerð*
151/21	21/00755-4	Ábøtur á ognirnar hjá Norðoya Fornminnasavni 2021 – *flyting millum kontur, seinna viðgerð*
Til viðgerðar fyri afturlatnum hurðum		
152/21	21/00915-3	Umsókn um leigugrund á havnalagi
153/21	21/00725-3	Umsókn um keyp av lendi
154/21	21/01048-1	Umsókn um meirøki

Atli S. Justinussen fór av fundinum kl. 19:15 (beint undan viðgerðini av málunum 152, 153 og 154)

Til viðgerðar

129/21
21/01168-2 Býráðslimur forfall - Jógvan Skorheim

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Klaksvíkar Býráð	23.09.2021	129/21

21/01168-2 Býráðslimur forfall - Jógvan Skorheim

Frágreiðing um málið:
Jógvan Skorheim, býráðslimur valdur fyri Sjálvstýri, hevur boðað frá, at hann hevur forfall til býráðsfundin 23. sept. 2021. Næstvaldu tvey á listanum hava bæði boðað frá, at teimum berst frá at møta sum tiltakslimir, og tí er heitt á Sven Dahl, ið er triðivaldur tiltakslimur á listanum, um at møta til fundin.

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin, § 18, stk. 1 og stk. 3

Fíggjarligar avleiðingar:
Fundarsamsýning til tiltakslimin, um býráðið avger at lata hann taka sætið í býráðnum til fundin.

Tilmæli:
Mælt verður býráðnum til at taka støðu til áheitanina um at innkalla tiltakslim fyri Jógvan Skorheim.

Klaksvíkar Býráð 23. september 2021:
Einmælt samtykt at lata Sven Dahl taka sæti á fundinum.

130/21
21/00942-17 Fíggjarætlan 2022 - Klaksvíkar Býráð - fíggjarkarmur 2022

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	21.09.2021	102/21
2 Klaksvíkar Býráð	23.09.2021	130/21

21/00942-17 Fíggjarætlan 2022 - Klaksvíkar Býráð - fíggjarkarmur 2022

Frágreiðing um málið:
Sambært kommunulógini skal býráðið samtykkja tann yvirskipaða fíggjarkarmin fyri komandi ár áðrenn 1. oktober.

Talvan niðanfyri vísir uppskot til fíggjarkarm 2022 og gongdina seinastu 4 árini.

Inntøkurnar komandi ár eru settar til 298,7 mió.kr., og hava tær støði í uppgerðunum, sum FMR og Taks sendu út fyrst í september.

Raksturin er settur til 237,6 mió.kr., sum er 8,6 mió.kr. hægri enn metta nýtslan 2021.

Avlopið frá rakstri er 61 mió.kr. Við rentustuðli (3,8 mió.kr.) og rentugjaldingar (3,4 mió.kr.) er avlopið áðrenn íløgur og avdráttir 53,8 mió.kr.

				Roknskapur 2021					
				Fíggjarætlan			Roknskapur		
Tkr	R 2018	R 2019	R 2020	Uppruna-ætlan	Eyka-játtan	Dagført ætlan	Meting roknskap 2021	Uppskot Æ2022	Munur M2021 Æ2022
Inntøkur	271.692	288.432	295.445	305.000	0	305.000	298.957	298.700	-257
Rakstrarútreiðslur	198.982	202.913	226.618	219.695	3.962	223.657	229.002	237.663	8.662
	72.711	85.518	68.827	85.305	-3.962	81.343	69.956	61.037	-8.919
Stuðul rentuútreiðslur bústað	3.648	3.675	3.754	3.600	0	3.600	3.868	3.800	-68
	69.062	81.843	65.073	81.705	-3.962	77.743	66.088	57.237	-8.852
Rentugjaldingar	6.315	3.076	3.065	3.400	0	3.400	3.300	3.400	100
Úrslit áðrenn rentur og avdráttir	**62.747**	**78.767**	**62.008**	**78.305**	**-3.962**	**74.343**	**62.788**	**53.837**	**-8.952**
Íløgur	75.855	106.293	118.929	78.200	81.278	159.478	145.355		
Úrslit áðrenn avdráttir	**-13.108**	**-27.526**	**-56.921**	**105**	**-85.240**	**-85.135**	**-82.567**	**53.837**	**-8.952**
Lutfall rakstur og inntøkur (%)	**73,2**	**70,4**	**76,7**				**76,6**	**79,6**	

Inntøkur
Seinastu 4 árini eru inntøkurnar hækkaðar 2,5% árliga. Persónskatturin og forskattingin av eftirlønum hava verið hækkandi, men higartil í ár hevur eingin vøkstur verið.
Partafelagsskatturin og afturberingin ísv. FAS, DIS v.m. hevur verið á sama stigi øll árini.

Roknskapur pr. 31-07-2021 + meting aug - des (útskrivað 14-09-2021) tkr									
	RAKSTUR	R 2018	R2019	R2020	Uppruna-ætlan	Eyka-játtan	Dagført ætlan	Meting roknskap 2021	Meting sb. Taks 2022
§ 20.	Kommunuskattur	202.310	217.102	221.132	235.000		235.000	225.884	225.900
§ 20	Húsaleiguskattur	154	62	7	0		0	24	
§ 20	Felagsskattur	21.097	18.730	20.867	16.000		16.000	16.254	16.000
§ 20	Skattur av eftirlønarinngjøldum	36.749	41.385	41.938	43.000		43.000	45.711	45.700
§ 20	Flyting vegna DIS, FAS og fradr	11.381	11.152	11.501	11.000		11.000	11.085	11.100
	Inntøkur	271.692	288.432	295.445	305.000	0	305.000	298.957	298.700

Taks kemur við nýggjari framrokning í oktober av persónsskatti og inntøkum ísbv. eldraøkið.

Rakstur

Í 2018 var raksturin 198,9 mió.kr., og í 2021 er hann mettur til 229 mió.kr. Hetta gevur ein árligan vøkstur upp á 3,8%.

Lutfallið millum rakstur og inntøkur er 79,6% í mun til 73,2% í 2018.

Um vit síggja burtur frá stuðlunum til Mentanarhúsið og Húsarhaldsskúlan, eru rakstrarútreiðslurnar hesar:

Tkr	R 2018	R2019	R2020	Dagført ætlan 2021	Meting roknskap 2021	Broyting 2018/2021
Rakstrarútreiðslur	198.982	202.913	226.618	223.657	229.002	30.020
Herav løgustuðul Mentanarhús og Húsarhaldssk.	3.239	0	5.047			
Rakstur uttan íløgustuðul	195.743	202.913	221.571	223.657	229.002	33.258

Tá er raksturin hækkaður 33,2 mió.kr., sum svarar til 17,8% ella 4,4% um árið.

Sambært FMR og KAF kunnu vit rokna við einum lønarvøkstri upp á 1,8%, sum svarar til 3,68 mió.kr. Afturat hesum koma aðrar hækkingar ísbv. økt virksemi - serliga NBH og nýggi ansingarstovnurin á Norðoyri.

Tkr	Lønir	Nýtt virksemi/upprað festinga	Íalt
NBH	1.630	2.413	4.043
Rakstrarstøð hjá kommununi	2.059		2.059
Norðoyri		3.200	3.200
Aðrar reguleringar		-640	-640
Ynski frá deildum eru ikki við !!!!			
	3.689	4.973	8.662

Tvs. verandi meting av rakstrinum 2022 hevur støði í mettu nýtsluni 2021 + sáttmálabundnar lønarhækkingar + samtykt hjá NBH + ansingarstovn á Norðoyri.
Møguligar aðrar uppraðfestingar og ynski eru ikki við her.

Rentustuðul og rentugjaldingar byggja eisini á framrokningar í 2021. Upphæddirnar eru ávikavist 3,8 mió.kr. og 3,4 mió.kr.

Skuld og nettoskuld

Uppgerðin vísir gongdina í ogn og skuld.

Bankaskuldin er í dag 270 mió.kr., men neyðugt verður at taka lán – minst 15 mió. kr. Við hesum verður bankaskuldin 285 mió.kr.

Í 2015 var nettoskuldin 92 mió.kr. undir eina álíkning, men gongdin higartil í ár bendir á, at við ársenda verður nettoskuldin oman fyri álíkningina.

Tkr	R 2015	R 2016	R 2017	R 2018	R 2019	R 2020	M 2021
Bankaskuld	157.067	147.180	144.371	142.353	157.351	157.894	279.806
Kreditorar v.m.	13.705	20.280	25.409	24.129	33.469	45.398	47.059
Bruttoskuld	170.772	167.460	169.780	166.483	190.820	203.292	326.865
FGJ, skuldarar v.m.	32.549	50.368	71.623	48.192	44.011	50.439	51.753
Innistanandi	40.088	47.899	17.949	24.636	23.746	-27.172	10.675
Áogn íalt	72.637	98.267	89.572	72.828	67.757	23.266	62.428
Nettoskuld	98.135	69.193	80.208	93.654	123.062	180.026	264.437
Ein álíkning 23%	190.296	199.347	215.197	220.247	239.166	246.374	246.374
Nettoskuld	98.135	69.193	80.208	93.654	123.062	180.026	264.437
Nettoskuld í mun til álíkning (tkr)	**92.161**	**130.154**	**134.989**	**126.592**	**116.104**	**66.348**	**-18.063**

Orsøkin til hækkandi nettoskuld er, at roknskapirnir 2018 – 2021 vísa 180 mió.kr. í halli.

Verandi uppskot til fíggjarkarm vísir 53,8 mió.kr. í avlopi áðrenn íløgur og avdráttir.

Við hesum verður málið um fíggjarkarm 2022 lagt fyri fíggjarnevnd og býráð til støðutakan.

Lógargrundarlag:
Kommunulógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Avlopið áðrenn íløgur og avdráttir er 53,8 mió.kr.

Tilmæli:
Uppskot til fíggjarkarm fyri 2022, verður hervið lagt fyri fíggjarnevnd og býráð til støðutakan

Fíggjarnevndin 21. september 2021:
Nevndin mælir til niðanfyri vísta karm fyri fíggjarætlanina fyri 2022 og beinir málið til býráðið og felags nevndarfund (temafund I):

	Uppskot Æ2022 (tkr.)
Inntøkur	305.000
Rakstrarútreiðslur	237.700
	67.300
Stuðul rentuútreiðslur bústað	3.800
	63.500
Rentugjaldingar	3.400
Úrslit áðrenn rentur og avdráttir	60.100
Íløgur	
Úrslit áðrenn avdráttir	60.100

Lutfall rakstur og inntøkur (%)	77,9%

Klaksvíkar Býráð 23. september 2021:
Atkvøtt varð um soljóðandi broytingaruppskot frá SVJ: "*Mælt verður til at taka undir við uppskotinum frá umsitingini, dagf. 16-09-2021, har inntøkurnar eru settar til 298,7 mió.kr, útreiðslurnar til 237,663 mió.kr., stuðul til rentuútreiðslur til 3,8 mió.kr. og rentur til 3,4 mió.kr. og einum úrsliti áðrenn avdráttir á 53,837 mió.kr.*"; tað fall við 3 atkvøðum fyri (SVJ, TJL og SD) og 7 atkvøðum ímóti (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP og ASB). ÓML atkvøddi ikki.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá FíN 21-09-2021; tað varð einmælt samtykt.

131/21
21/00407-21 Umfígging og lántøka, 2021 - lántøka oktober 2021

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	21.09.2021	103/21
2 Klaksvíkar Býráð	23.09.2021	131/21

21/00407-21 Umfígging og lántøka, 2021 - lántøka oktober 2021

Frágreiðing um málið:
Vísandi til málið í mai um lántøku (mál 21/00407-8) verður hervið heitt á fíggjarnevnd og býráð um at umsitingin fær heimild at taka lán upp á 15 mió.kr. til fígging av virkseminum í 2021.

				Roknskapur 2021			
				Fíggjarætlan			Roknskapur
Tkr	R 2018	R 2019	R 2020	Uppruna-ætlan	Eyka-játtan	Dagførd ætlan	Meting roknskap 2021
Inntøkur	271.692	288.432	295.445	305.000	0	305.000	298.957
Rakstrarútreiðslur	198.982	202.913	226.618	219.695	3.962	223.657	229.002
	72.711	85.518	68.827	85.305	-3.962	81.343	69.956
Stuðul rentuútreiðslur bústað	3.648	3.675	3.754	3.600	0	3.600	3.868
	69.062	81.843	65.073	81.705	-3.962	77.743	66.088
Rentugjaldingar	6.315	3.076	3.065	3.400	0	3.400	3.300
Úrslit áðrenn rentur og avdráttir	**62.747**	**78.767**	**62.008**	**78.305**	**-3.962**	**74.343**	**62.788**
Íløgur	75.855	106.293	118.929	78.200	81.278	159.478	145.355
Úrslit áðrenn avdráttir	**-13.108**	**-27.526**	**-56.921**	**105**	**-85.240**	**-85.135**	**-82.567**
Gjaldføri primo							0
Lántøka mai							50.000
Lántøka august							20.000
Lántøka jan - august							70.000
Munur lán til fígging av virkseminum 2021							**-12.567**

Metingin av roknskapinum 2021 sigur, at avlopið eftir íløgur verður -82,5 mió.kr. Tað merkir, at kommunan skal taka lán upp á 82,5 mió.kr. til fígging av virkseminum 2021.
Tá er roknað við, at inntøkurnar verða 299 mió.kr. og íløgurnar 145 mió.kr. Um hesi ganga skeiva vegin, verður lánitørvurin tað størri.

Higartil eru 2 lán upp á samanlagt 70 mió.kr. tikin til fígging av hallinum. Í mai 50 mió.kr. og august 20 mió.kr. Sostatt restar lántøka upp á 12,5 mió.kr., sum rundað verður av til 15 mió.kr.

Annars var eitt lán tikið í mars ísbv. umfígging av skuldini. Av tí at kommunan einki hevur sett av til avdráttur, og lániavtalurnar siga, at avdráttirnir eru 10 mió.kr., var umfígging gjørd í mars, har kommunan tók lán upp á 10 mió.kr. Henda lántøka dekkar nevndu avdráttir og ávirkar gjaldførið, tá gjørt verður upp í desember, og tí er tað lánið ikki við í uppgerðini omanfyri.

Gjaldførið annars
Av tí at lutfallið millum innistandandi og skuld var negativ við ársbyrjan, er neyðugt við enn einari lántøku – minst 20 mió.kr. – til at byggja upp gjaldførið.

Roknskapurin 2020 vísir, at lutfallið millum innistandandi og kreditorar var óheppið. Innistandandi var 10,6 mió.kr. og kreditorar v.m. 56,9 mió.kr. = - 45,7 mió.kr. Um vit taka millumrokningina við FGJ (37,2 mió.kr.), er munurin -8,5 mió.kr.

Nevnast skal eisini, at stóru skattainntøkurnar – serliga felagsskatturin - fella til gjaldingar síðst í árinum.

Hetta sigur okkum, at kommunan eigur at hava minst 20 mió.kr. meira í tøkum peningi til fígging av virkseminum.

Leggjast skal afturat, at hetta lánið er ætlað til gjaldførið og ávirkar - alt annað líka – ikki nettoskuldina.

Myndugleikagóðkenning
Av tí at skuldin er ájavnt ella omanfyri álíkningina, eiga vit at tryggja okkum, at formalia mótvegis landsstýrinum er í lagi ísbv. lántøkuna. Vit kunnu eisini rokna við, at fíggjarstovnurin setur krøv um hetta. Í samskiftinum við landsstýrið er hóskandi at kunna um tepra gjaldførið, og at vit helst skulu hava enn eitt lán seinni í árinum.

Lógargrundarlag:
§ 43. Til lántøku, veðsetan, nýtslu av rakstraravlopi og tílíkum krevst samtykt frá kommunustýrinum.
Stk. 2. Er nettoskuldin meira enn ein álíkning eftir einum av landsstýrismanninum árliga ásettum skattaprosenti, krevst loyvi frá landsstýrismanninum til lántøku og til broytingar í lánitreytunum

Fíggjarligar avleiðingar:
Lántøkan upp á 15 mió.kr. fer til fígging av hallinum í roknskapinum.

Tilmæli:
Mælt verður til, at fíggjarnevndin og býráðið geva umsitingini heimild at taka upp lán á 15 mió.kr. og heimild at arbeiða víðari við aðrari lántøku til betran av gjaldførinum.

Fíggjarnevndin 21. september 2021:
Ein meiriluti, KHJ, ASJ og OáL, tekur undir við, at tiknar verða 30 mió.kr. í láni til at betra um gjaldførið umframt 15 mió.kr. til fígging av virkseminum í 2022 og heimilar umsitingini at heinta inn tilboð hesum viðvíkjandi.
TJL tekur støðu í býráðnum.

Klaksvíkar Býráð 23. september 2021:
Atkvøtt varð um soljóðandi broytingaruppskot frá SVJ: "*Mælt verður til at taka undir við tilmælinum frá umsitingini, dagf. 16-09-2021, har umsitingin fær heimild at taka upp lán á 15 mió.kr.*"; tað fall við 4 atkvøðum fyri (SVJ, TJL, ÓML og SD), og 7 atkvøðum ímóti (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP og ASB).

Atkvøtt varð síðani um meirilutatilmælið í FíN 21-09-2021; tað varð samtykt við 7 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP og ASB) og 3 atkvøðum ímóti (SVJ, ÓML og SD). TJL atkvøddi ikki.

132/21
21/00934-1 Reglugerð um fulltrú til kommunalar bindingar - dagføring ísv. kommunustjóraskifti

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	21.09.2021	104/21
2 Klaksvíkar Býráð	23.09.2021	132/21

21/00934-1 Reglugerð um fulltrú til kommunalar bindingar - dagføring ísv. kommunustjóraskifti

Frágreiðing um málið:
Í samband við at nýggjur kommunustjóri hevur tikið við 1. aug. 2021, skal reglugerðin um fulltrú til kommunalar bindingar dagførast (sí viðhefta uppskot til dagførda reglugerð).

Lógargrundarlag:
Kommunustýrislógin § 44, stk. 2: ”*skjøl viðvíkjandi keypi og sølu av fastari ogn o.t. skulu verða undirskrivað av borgarstjóranum og einum persóni, sum kommunustýrið hevur heimilað til tess*”.
Sambært viðmerking til omanfyrinevndu lógargrein “*skal kommunustýrið tilnevna persónliga og við navns nevni medundirskrivaran hjá borgarstjóranum. Starvsheitið er ikki nøktandi*”.

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar

Tilmæli:
Mælt verður til at taka undir við dagførdu reglugerðini.

Fíggjarnevndin 21. september 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 16-09-2021.

Klaksvíkar Býráð 23. september 2021:
Tilmælið frá FíN 21-09-2021 einmælt samtykt.

133/21
21/00348-18 Umsiting av Klaksvíkar Hermetikk

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Havna- og Vinnunevndin	15.09.2021	45/21
2 Klaksvíkar Býráð	23.09.2021	133/21

21/00348-18 Umsiting av Klaksvíkar Hermetikk

Frágreiðing um málið:
Í samband við at arbeiðið at umvæla *Klaksvíkar Hermetikk* er komið so mikið áleiðis, er næsta stig í verkætlanini at seta á stovn eina nevnd, sum hevur ábyrgd av viðlíkahaldi og umsiting av felags útbúnaði.

Bygningurin, ***Klaksvíkar Hermetikk***, er skipaður sum eitt eigaraíbúðarfelag. Tað vil siga, at hvør skúrur er tinglýstur sum ein eigaraíbúð sambært tinglýsingini.
Vísandi til lógina um eigaraíbúðarfelag, er neyðugt at seta á stovn eina nevnd, sum hevur til uppgávu at fremja endamál eigarafelagsins og umboða felagið úteftir.

Umsitingin mælir til, at skúreigararnir og kommunan rinda hvør sína helvt av einum føstum gjaldi til ein nýggjan umsitingargrunn.

Allar avgerðir verða tiknar við atkvøðumeiriluta, har Klaksvíkar kommuna eigur helmingin av atkvøðunum, og hinir skúreigararnir eiga hin helmingin av atkvøðunum.
Nevndin verður stýrd av einari 4-mannanevnd, sum verður vald á aðalfundi. Fyrsta nevndin verður formliga vald á stovnandi aðalfundinum. Ein valdur nevndarlimur situr 2 ár. 2 nevndarlimir verða valdir á ári, sum er eitt líka ár, og 2 nevndarlimir verða valdir á ári, sum er eitt ólíka ár. Tiltakslimir sita 2 ár, og stendur ein fyri vali hvørt ár.

Skúreigararnir hava, sum umboð fyri seg, peikað á
Umboð fyri Klaksvíkar Hermetikk

- Alfred Eliasen
- Jóannes Mikkelsen

Eykalimir:
- Finn Jacobsen
- Kaj Jacobsen

Umboðandi Klaksvíkar kommunu er ein møguleiki, at nevndin verður skipað soleiðis:
- Formaðurin í havna- og vinnunevndini hevur fastan formanssess.
- Hin sessurin er mannaður av einum umboði fyri fyrisitingina.
- Umframt hetta veitir fyrisitingin sekretariat, ið eisini luttekur á fundum felagsins.

Lógargrundarlag:
Reglugerð nr. 83 frá 18. november 1970 fyri eigarafeløg sambært løgtingslóg um eigaraíbúðir.

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar.

Tilmæli:
Mælt verður til, at nevndir og býráð taka støðu til, hvussu Klaksvíkar kommuna er umboðað í eigaraíbúðarfelagnum.

Havna- og Vinnunevndin 15. september 2021:
Nevndin mælir til, at býráðsminnilutin eisini fær eitt umboð í nevndina, umframt at fyrstnevndi eykalimur nevndur í tilmælinum frá umsitingini dagf. 06-07-2021 fær sess í nevndini.

Klaksvíkar Býráð 23. september 2021:
Tilmælið frá HaVN 15-09-2021 einmælt samtykt.

134/21
18/01217-27 Stroyming av býráðsfundum - endurskoðan

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Fíggjarnevndin	21.09.2021	105/21
2 Klaksvíkar Býráð	23.09.2021	134/21

18/01217-27 Stroyming av býráðsfundum - endurskoðan

Frágreiðing um málið:
Seint í 2013 varð lýst alment eftir veitara at taka sær av stroyming av almennu býráðsfundunum, og í apríl 2014 varð fyrsti býráðfundurin stroymdur á alnótini. Sami veitari hevur alla tíðina havt arbeiðið um hendur.

Aðrir veitarar av somu tænastu hava í nøkrum førum vent sær til Klaksvíkar kommunu fyri at vita, um møguleiki er at sleppa at veita býráðnum eina stroymingsloysn, og í tí sambandi er áheitan komin frá politisku leiðsluni um at endurskoða stroymingina av almennu býráðsfundunum.

Ynskið er at umrøða, um stroymingin skal halda fram sum nú, ella um tíðin er komin at gera eina nýggja útbjóðing.

Sáttmálin millum kommununa og núverandi veitara kann sigast upp við eini freist á 3 mánaðir til ein 1. í mánaðinum.

Lógargrundarlag:
- Kommunufulltrúin
- § 2 í sáttmála um stroyming av almennu fundum Klaksvíkar Býráðs

Fíggjarligar avleiðingar:
Verður avgjørt at fara undir nýggja útbjóðing, fer eitt nú framleiðsla av lýsing at kosta nakað, hetta er tó ikki kannað gjøllari enn.

Tilmæli:
Mælt verður fíggjarnevndini og býráðnum til at umrøða og taka støðu til, um núverandi stroymingsloysn skal halda fram, ella um nýtt útboð skal vera.

Fíggjarnevndin 21. september 2021:
Nevndin mælir til, at nýtt útboð skal vera. Útbjóðingartilfarið skal eisini umfata møguleika fyri at goyma fundir á netinum.

Klaksvíkar Býráð 23. september 2021:
Tilmælið frá FíN einmælt samtykt.

135/21
20/01182-25 Broyting av byggisamtykt fyri Trøllanes

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Trøllanesnevndin	01.09.2021	10/21
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	13.09.2021	106/21
3 Tekniska Nevnd	15.09.2021	57/21
4 Klaksvíkar Býráð	23.09.2021	135/21

20/01182-25 Broyting av byggisamtykt fyri Trøllanes

Frágreiðing um málið:
Broytingaruppskot fyri Trøllanes lá frammi til alment eftirlit frá 08/06-21 til 20/07-21. Inn komu tvær viðmerkingar/kærur, ið eru nærri lýstar í skrivi frá umsitingini, dagf. 28. aug. 2021.

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir v.m.
Kommustýrislógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar

Tilmæli:
1. Uppskot til byggisamtyktarbroyting verður latið nevndunum til viðgerðar, sí uppskot 1 og 2.
2. Og at møgulig loysn fyri privata vegin verður tikið upp til umrøðu.

Trøllanesnevndin 1. september 2021:
Nevndin staðfestir at spurningur kann setast við gegnið hjá nevndarlimum. Tí beinir ein samd nevnd málið til UBN og Klaksvíkar Býráð.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 13. september 2021:
Signhild V. Johannesen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.
Nevndin tekur undir við uppskoti 2 í tilmælinum, dagf. 23-08-2021.
Møgulig loysn av privata vegnum verður tikið upp sum serstakt mál.

Tekniska Nevnd 15. september 2021:
Nevndin tekur undir við UBN 13-09-2021.

Klaksvíkar Býráð 23. september 2021:
Signhild V. Johannesen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.
Tilmælið frá TN 15-09-2021 einmælt samtykt.

136/21
19/00950-81 Byggisamtykt fyri Svínoy - Eftir almenna hoyring

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Svínoyarnevndin	02.09.2021	17/21
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	13.09.2021	105/21
3 Klaksvíkar Býráð	23.09.2021	136/21

19/00950-81 Byggisamtykt fyri Svínoy - Eftir almenna hoyring

Frágreiðing um málið:
Uppskot til byggisamtykt fyri Svínoy hevur ligið frammi til alment eftirlit í Miðlan í Klaksvík og í Dansistovuni í Svínoy frá 23.03.2021 – 13.04.2021. Somuleiðis varð lýst á heimasíðu kommununnar, portal.fo og í Norðlýsinum.
Kærufreistin var úti 04.05.2021, og inn komu 12 viðmerkingar/kærur, ið eru nærri lýstar í skrivi frá umsitinini, dagf. 23. aug. 2021.

Eftir viðgerð og regulering metir tekniska fyrisiting, at byggisamtyktaruppskotið er búgvið til alment eftirlit. Og farast kann undir tilgongdina við almennari framløgu og síðan góðkenning frá Umhvørvis- og Vinnumálaráðnum.

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir v.m.

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar

Tilmæli:
Við hesum verður málið lagt fyri nevnd til umrøðu og støðutakan.

Svínoyarnevndin 2. september 2021:
Nevndin tekur undir við at seinasta uppskotið til bygdaætlan fyri Svínoy verður lagt fram til almenna hoyring.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 13. september 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá Svínoyarnevndini 2. sept. 2021.

Klaksvíkar Býráð 23. september 2021:
Tilmælið frá UBN 13-09-2021 einmælt samtykt.

137/21
19/01422-9 Uppskot til byggisamtyktarbroyting – Økispartur C12 til A18

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	13.09.2021	112/21
2 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	14.09.2021	K-6/21
3 Klaksvíkar Býráð	23.09.2021	137/21

19/01422-9 Uppskot til byggisamtyktarbroyting – Økispartur C12 til A18

Frágreiðing um málið:
Eftir áheitan frá borgarstjóranum verður uppskot um byggisamtyktarbroyting lagt fyri nevnd og býráð. Skotið verður upp broyta C12 (Almennir bygningar v.m.) til A18 (Blandað íbúðar- og vinnuendamál). Endamálið við broytingini er, at umtalaða økið skal nýtast til framtíðar bústaðarbygging.
C12 umfatar allan matr.nr. 973, oman Valrætt. Stykkið á góðar 1,35 ha og er útgrivið. Útgrevsturin varð framdur ísb. við ætlaða ansingarstovnin.

Lógargrundarlag:
Almenna byggisamtyktin fyri Klaksvíkar kommunu
Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir v.m.

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar

Tilmæli:
Málið verður latið nevnd og býráð til viðgerð og støðutakan, um farast skal undir broytingina av C12 til A18.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 13. september 2021:
Ein meiriluti, GvK, ASB og OáL, tekur undir við tilmælinum, dagf. 02-09-2021.
JS og SVJ taka støðu í býráðnum.

Trivnaðarnevndin Børn og Ung 14. september 2021:
Ein meiriluti, EyÓP, ASB og JCC, tekur undir við meirilutanum í UBN, dagfest 13-09-2021.
Ein minniluti, TJL, tekur støðu í býráðnum.

Klaksvíkar Býráð 23. september 2021:
Meirilutatilmælini frá UBN 13-09-2021 og B&U 14-09-2021 einmælt samtykt.

138/21
21/01046-1 Skúrbýur norðanfyri Valrætt

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	13.09.2021	113/21
2 Tekniska Nevnd	15.09.2021	56/21
3 Fíggjarnevndin	21.09.2021	109/21
4 Klaksvíkar Býráð	23.09.2021	138/21

21/01046-1 Skúrbýur norðanfyri Valrætt

Frágreiðing um málið:
Í skrivi frá umsitingini, dagf. 3. sept. 2021, er greitt nærri frá málinum, ið í stuttum snýr seg um, at fyrispurningur er komin frá Articon um eitt øki til skúrbý í Klaksvík, meðan tunlarnir "Norður um Fjall" eru í gerð. Pláss er ikki fyri nevnda skúrbýi í Árnafirði, og onnur ætlan, sum Articon hevur arbeitt við, er steðgað upp. Articon spyr eftir einum leiguøki uppá 2000 fermetrar, har 50 arbeiðsfólk koma at búgva í trý ár.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin
Bygningskunngerðin BK17

Fíggjarligar avleiðingar:
Árliga leiguinntøkan verður einar 37 tkr. um árið.
Sambært upplýsing frá Articon verður talan um einar 50 nýggjar skattaborgarar í kommununi komandi 3 árini.

Tilmæli:
Um tikið verður undir við málinum, mælir fyrisitingin til eina almenna kunning um málið. Fyrisitingin kann annars viðmæla, at ein leiguavtala verður gjørd við Articon sambært omanfyri standandi.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 13. september 2021:
Ein meiriluti, GvK, ASB og OáL, tekur undir við tilmælinum, dagf. 03-09-2021.
JS og SVJ taka støðu í býráðnum.

Tekniska Nevnd 15. september 2021:
Ein meiriluti, OáL, EÓP og ASJ, tekur undir við meirilutanum í UBN 13-09-2021.
TJL tekur støðu í býráðnum.

Fíggjarnevndin 21. september 2021:
Ein meiriluti, KHJ, ASJ og OáL, tekur undir við meirilutunum í UBN 13-09-2021 og TN 15-09-2021.
TJL tekur støðu í býráðnum.

Klaksvíkar Býráð 23. september 2021:
Meirilutatilmælini í UBN 13-09-2021, TN 15-09-2021 og FíN 21-09-2021 einmælt samtykt.

139/21
21/00624-6 Atkoma til matr.nr. 989 frá Kósabrúnni

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Ferðslunevndin	13.09.2021	30/21
2 Havna- og Vinnunevndin	15.09.2021	49/21

3 Tekniska Nevnd	15.09.2021	53/21
4 Klaksvíkar Býráð	23.09.2021	139/21

21/00624-6 Atkoma til matr.nr. 989 frá Kósabrúnni

Frágreiðing um málið:
Atkoman til matr.nr. 989 er frá Stangavegnum. Í juni 2021 er ein umsókn frá eigaranum løgd fyri avvarðandi nevndir, har tað verður søkt um ein tinglisnan koyri- og gongurætt til matr.nr. 989 frá vegnum Kósabrúgvin. Viðkomandi nevndir samtyktu, at málið skal lýsast betur og leggjast fyri aftur fyrsta umfar eftir summarsteðgin.

Tá málið bleiv lagt fyri í juni 2021, bleiv tíanverri ikki upplýst, at byggisamtyktin er broytt í samband við eina umsókn um meirlendi frá umsøkjaranum í 2018, og hevur eigarin av matr.nr. 989 tí fingið játtað lendi til keyps oman til vinnuøkið, og málið er avgreitt av kommununi. Vegaumsitarin kendi ikki til hesa viðtøkuna, tá málið bleiv lagt fyri í juni 2021.

Vísandi til, at talan er um atkomu frá einum vinnuøki (B9) til eina ogn í búðstaðarøki (A18), og at ymiskar umstøður í samband við virkini og vinnuøkið í B9 annars hava fingið sera nógva umrøðu fyri árum síðani, so metti fyrisitingin, at neyðugt var við einari breiðari afturlítandi kunning, serliga um tað ferðsluliga í samband við vinnuøkið á Kósini (B9), og tí var farið fleiri ár aftur í tíðina.

Víst verður annars til nærri útgreinandi skriv frá umsitingini, dagf. 28. juli 2021.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin.

Fíggjarligar avleiðingar:
Ókent.

Tilmæli:
Við hesum verður málið lagt fyri viðkomandi nevndir av nýggjum.

Ferðslunevndin 13. september 2021:
Nevndin metir, at ein tinglisin koyri- og gangirættur sannlíkt fer at viðføra ferðsluligar avbjóðingar í økinum. Nevndin mælir tí til, at allir viðkomandi partar verða hoyrdir, áðrenn avgerð verður tikin.

Havna- og Vinnunevndin 15. september 2021:
Nevndin tekur undir við, at umsøkjarin fær tinglisnan koyri- og gangirætt til matr.nr. 989 frá vegnum Kósabrúgvin.

Tekniska Nevnd 15. september 2021:
Nevndin tekur undir við HaVN 15-09-2021.

Klaksvíkar Býráð 23. september 2021:
Tilmælið frá TN 15-09-2021 einmælt samtykt.

140/21
21/01075-1 Broyting av byggisamtykt - Broyting av hæddarásetingum fyri B5, Klaksvík

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	13.09.2021	126/21
2 Havna- og Vinnunevndin	15.09.2021	47/21
3 Klaksvíkar Býráð	23.09.2021	140/21

21/01075-1 Broyting av byggisamtykt - Broyting av hæddarásetingum fyri B5, Klaksvík

Frágreiðing um málið:
Í samband við at Blikksmiðjan søkir um prinsipielt byggiloyvi (mál nr. 21/01074) á ta útfylling, ið er gjørd á Vágni niðanfyri Blikksmiðjuna, so er hæddarásetingin ein forðan fyri teirra bygging.
Ætlanin er at byggja ein smiðjubygning, ið er 55 metur langur og 14 metur breiður, tilsaman 770 m^2.

Hæddin av bygninginum er 9,5 metur, og fyri starvsfólkapartin verður hæddin 12,3 m.

Matrikulviðurskiftini eru ígongd.

Lógargrundarlag:
Økið er útlagt til vinnu- og mentunnarøki B5, har bygningshædd frá bryggjukanti í mesta lagi kann verða 8,5 m.

Hæddarásetingar fyri tey umkringliggjandi økini eru væl hægri enn fyri B5. B6 er 13 m í mun til bryggjukant, A13 upp til kotu 16, og C11 er 11 m. Einans ein annar bygningur er í øki B5, og tí er avleiðingin eisini avmarkað víðari.

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar

Tilmæli:
Mælt verður til at broyta hæddarásetinga fyri B5 til 13 m, eins og uppatliggjandi B6 øki, so umsókta bygging rúmast innan karmarnar í byggisamtyktini.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 13. september 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 03-09-2021.

Havna- og Vinnunevndin 15. september 2021:
Nevndin tekur undir við UBN 13-09-2021.

Klaksvíkar Býráð 23. september 2021:
Tilmælið frá HaVN 15-09-2021 einmælt samtykt.

141/21
21/00615-2 Viðv. sundurbýti av matr.nr. 10a á Trøllanesi

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Trøllanesnevndin	01.09.2021	11/21
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	13.09.2021	118/21
3 Klaksvíkar Býráð	23.09.2021	141/21

21/00615-2 Viðv. sundurbýti av matr.nr. 10a á Trøllanesi

Frágreiðing um málið:
21. des. 2020 søkir Búnaðarstovan Umhvørvisstovuna um sundurbýti av matr.nr. 10a á Trøllanesi, og 4. mai 2021 biður Umhvørvisstovan um kommununnar ummæli til umsókta sundurbýti.

Tekniska Fyrisiting hevur hesar viðmerkingar til umsóknina:
Byggisamtyktarliga er talan um lendi í økisparti A28. (Blandað íbúðar- og vinnuendamál), har minsta mark grundøkjavídd er sett at vera 300 m^2. – Ongin áseting er um maximum vídd.

Lógargrundarlag:
Matrikullógin
Almenna Byggisamtyktin fyri Klaksvíkar kommunu

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar – kommunan bert ummælandi

Tilmæli:
Vísandi til omanfyri nevnda og við støði í innsendum skjølum frá Óla M. Hansen, advokati, mælir Tekniska Fyrisiting til at viðmæla umsóknini. – Tó verður gjørt vart við, at møgulig framtíðar broytt nýtsla og sundurbýti av frábýtta økinum eigur at vera í tráð við galdandi byggisamtykt fyri økið. (Málið er eisini sett á skrá hjá Trøllanesnevndini, sum sambært fundarætlanini hevur fund 1. september 2021. – Ein møguleiki er, at málið verður avgreitt hetta umfarið (áðrenn summarsteðgin), og Trøllanesnevndin verður kunnað á fyrstkomandi fundi – hetta er upp til UBN/borgarstjóran at avgera.)

Trøllanesnevndin 1. september 2021:
Nevndin er kunnað um málið.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 13. september 2021:
Signhild V. Johannesen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 03-06-2021.

Klaksvíkar Býráð 23. september 2021:
Signhild V. Johannesen luttók ikki í viðgerðini av málinum vegna ógegni.
Tilmælið frá UBN 13-09-2021 einmælt samtykt.

142/21
21/00937-2 Sundurbýti av matr.nr. 910 í Klaksvík

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	13.09.2021	123/21
2 Klaksvíkar Býráð	23.09.2021	142/21

21/00937-2 Sundurbýti av matr.nr. 910 í Klaksvík

Frágreiðing um málið:
Í e-posti frá 22. juli 2021 biður Umhvørvisstovan um býráðsins ummæli til sundurbýti av matr.nr. 910 við Borðoyarvík í Klaksvík
Talan er um framhald av sundurbýti í máli 20/00951, og er umsóknin í tráð við loyvdu bygging á økinum (mál 21/00159).

Lógargrundarlag:
Matrikullógin
Friðingarmyndugleikar (Loyvi dagf. 13. juli 2021 frá Yvirfriðingarnevndini fyriliggur)
Almenna Byggisamtyktin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar – kommunan bert ummælandi partur

Tilmæli:
Tekniska Fyrisiting mælir til at viðmæla umsóknini.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 13. september 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 31-08-2021.

Klaksvíkar Býráð 23. september 2021:
Tilmælið frá UBN 13-09-2021 einmælt samtykt.

143/21
21/00909-2 Marknaumskipan - matr.nr. 1411 og 1414

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	13.09.2021	122/21
2 Klaksvíkar Býráð	23.09.2021	143/21

21/00909-2 Marknaumskipan - matr.nr. 1411 og 1414

Frágreiðing um málið:
Víst verður til umsókn um marknaumskipan dagf. 08.07.2021.

Tekniska Fyrisiting hevur hesar viðmerkingar:
Talan er um skipan av marki í mun við verandi umstøður. Stoyptur garður á staðnum verður nýtt matrikulmark.

Lógargrundarlag:
Matrikulógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar – kommunan bert ummælandi partur

Tilmæli:
Tekniska Fyrisiting mælir til at viðmæla umsóknini, og at umsóknin verður send Umhvørvisstovuni til góðkenningar, tá fulltrú uppá undirskriving av umsóknarblaðið fyriliggur.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 13. september 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 31-08-2021.

Klaksvíkar Býráð 23. september 2021:
Tilmælið frá UBN 13-09-2021 einmælt samtykt.

144/21
21/01002-2 Umsókn um marknaumskipan og góðkenning til vegakomu - matr.nr. 582 og 579b

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	13.09.2021	124/21
2 Tekniska Nevnd	15.09.2021	50/21
3 Klaksvíkar Býráð	23.09.2021	144/21

21/01002-2 Umsókn um marknaumskipan og góðkenning til vegakomu

Frágreiðing um málið:
Eigararnir av matr.nr. 582 og 579b søkja um marknaumskipan, sum víst á viðheftu umsókn. Lagt verður afturat, at umsóknin er treytað av, at atkoma verður loyvd frá Vágsheygsgøtu gjøgnum matr.nr. 583.

Hvat viðvíkur atkomu frá Vágsheygsgøtu gjøgnum matr.nr. 583 er at siga, at tvær av grannaognunum longu koyra gjøgnum nevnda økið.

Lógargrundarlag:
Matrikullógin
Almenna Byggisamtyktin

Fíggjarligar avleiðingar:
Kommunan bert ummælandi partur ísv. ummatrikuleringina

Tilmæli:
Tekniska Fyrisiting mælir til at viðmæla umsóknini

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 13. september 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 31-08-2021.

Tekniska Nevnd 15. september 2021:
Nevndin tekur undir við UBN 13-09-2021.

Klaksvíkar Býráð 23. september 2021:
Tilmælið frá TN 15-09-2021 einmælt samtykt.

145/21
20/00848-24 Lendi til wc/bíðirúm/goymslurúm

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Svínoyarnevndin	02.09.2021	21/21
2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	13.09.2021	117/21
3 Fíggjarnevndin	21.09.2021	110/21
4 Klaksvíkar Býráð	23.09.2021	145/21

20/00848-24 Lendi til wc/bíðirúm/goymslurúm

Frágreiðing um málið:
Vístverður til samtyktina í SvíN og UBN ávikavist 15. febr. og 19. apríl 2021.

Sum svar uppá áheitanina um sølu av uml. 690 m^2 til wc/bíðirúm, boðar hagastýrið frá, at tey eru sinnað at lata lendið til ætlaða endamálið, men at bjóðaði písurin er ov lágur.
Hagastýrið skjýtur upp samráðing um sølu av økinum (fyri ein hægri prís) ella avtalu um langtíðarleigu. (Í samband við langtíðarleigu verður upplýst, at Klaksvíkar Býráð á fundi 28-05-2020 samtykti nýggjar leiguprísir fyri lendi uttangarðs.)
Hagastýrið hevur givið umboði heimild til at samráðast stýrisins vegna í hesum máli.

Á fundi við hagastýrisumboðið tyktist, sum hugurin til at leiga er størri enn til sølu. Partarnir avtalaðu, at fyrisitingin sendir hagastýrisumboðnum samtyktu leiguprísirnar fyri lendi uttangarðs eins og kommununnar max boð uppá keypsprís. Umboðið letur okkum so frætta aftur, tá tað hevur umrøtt málið við hinar eigararnar.

Aðrir myndugleikar at hoyra:
- Friðingarmyndugleikar
- Landsverk (er avgreitt)

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Við keyp: kr. 23.460,- + uml. 8.000,- fyri matrikulering
Við leigu: kr. 3000,- pr. ár í 10 ár

Tilmæli:
Út frá omanfyrinevnda verður skotið upp, at tekniska fyrisiting fær heimild til at samráðast við eigararnar um at:
- leiga lendið við t.d. 10 ára leigusáttmála fyri kr. 3000,- pr.ár.

ella
- keyp av lendi fyri kr. 34,-/m^2, sum er hægsti Búnaðarstovuprísur í Svínoynni. Gjørt verður vart við, at kommunal grundstykkir í oynni hava søluprísin kr. 90,-/m^2, harav kr. 50,-/m^2 er íbindingargjald. TF sær tí fyri sær max kr. 34,-/m^2

Svínoyarnevndin 2. september 2021:
Spurningur kann setast við gegnið hjá nevndarlimum, og tí beinir nevndin málið víðari til viðkomandi býráðsnevnd.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 13. september 2021:
Ein minniluti, GvK og ASB, mælir umsitingini til at fara í samráðingar við eigararnar um antin leigu ella keyp av lendinum.
Ein annar minniluti, SVJ og JS, mælir umsitingini til at samráðast um keyp av lendinum.
Ein triði minniluti, OáL, mælir til, at vent verður aftur til upprunastaðsetingina, ið er bæði ein betri og bíligari staðseting.

Fíggjarnevndin 21. september 2021:
Ein meiriluti, KHJ og ASJ, tekur undir við fyrsta minnilutanum, GvK og ASB, í UBN 13-09-2021.
Ein minniluti, TJL, tekur undir við øðrum minnilutanum, SVJ og JS, í UBN 13-09-2021.
Ein annar minniluti, OáL, tekur undir við triðja minnilutanum í UBN 13-09-2021.

Klaksvíkar Býráð 23. september 2021:
Atkvøtt varð um soljóðandi broytingaruppskot frá OáL: "*Mælt verður til at venda aftur til upprunaligu staðsetingina*"; tað fall við 1 atkvøðu fyri (OáL) og 4 atkvøðum ímóti (KHJ, ASJ, GvK og SVJ). EÓP, JCC, ASB, TJL, SD og ÓML atkvøddu ikki.

Síðani varð atkvøtt um minnilutatilmælið frá SVJ og JS í UBN 13-09-2021, tvs. keypi; tað fall við 3 atkvøðum fyri (SVJ, SD og TJL) og 5 atkvøðum ímóti (KHJ, ASJ, GvK, EÓP og ASB). OáL, ÓML og JCC atkvøddu ikki.

At enda varð atkvøtt um minnilutatilmælið frá GvK og ASB í UBN 13-09-2021, tvs. antin leigu ella keypi; tað varð samtykt við 10 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, GvK, JCC, EÓP, ASB, SD, SVJ, TJL og ÓML), og ongari atkvøðu ímóti. OáL atkvøddi ikki.

146/21
21/00845-5 Viðv. keyp av meirøki afturat matr.nr. 898 við Borðoyarvík

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	13.09.2021	121/21
2 Havna- og Vinnunevndin	15.09.2021	K-12/21
3 Klaksvíkar Býráð	23.09.2021	146/21

21/00845-5 Viðv. keyp av meirøki afturat matr.nr. 898 við Borðoyarvík

Frágreiðing um málið:
Umsøkjari hevur søkt Búnaðarstovuna um loyvi at keypa 2 metrar vestanfyri og 2 metrar sunnanfyri neystið, sum hann er í ferð við at víðka/byggja uppaftur á matr.nr. 898.
Festarin hevur viðmælt søluna.

Lógargrundarlag:
Martikullógin
Almenna Byggisamtyktin fyri Klaksvíkar Kommunu

Fíggjarligar avleiðingar:
Kommunan bert ummælandi partur

Tilmæli:
Tekniska Fyrisiting hevur ongar viðmerkingar til søluna.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 13. september 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 02-09-2021.

Havna- og Vinnunevndin 15. september 2021:
Málið verið til kunningar.

Klaksvíkar Býráð 23. september 2021:
Tilmælið frá UBN 13-09-2021 einmælt samtykt.

147/21
21/00897-1 Søla av kommunalum grundøkjum

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	13.09.2021	109/21
2 Fíggjarnevndin	21.09.2021	114/21
3 Klaksvíkar Býráð	23.09.2021	147/21

21/00897-1 Søla av kommunalum grundøkjum

Frágreiðing um málið:
Víst verður til skriv frá umsitingini, dagf. 15. juli 2021, ið greiðir nærri frá málinum. Í stuttum snýr tað seg um spurningin, um matr.nr. 125i í Klaksvík skal setast alment til sølu til ein ávísan m^2-prís, og um matr.nr. 25h og 25k á Norðoyri og fýra grundøkir í útstykkingini á Fossum skulu bjóðast út eftir grundstykkjalistanum.

Lógargrundarlag:
Reglugerð fyri grundstykkjalistan
Kunngerð nr. 122 frá 22. des. 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn.

Fíggjarligar avleiðingar:

Undir Klakki		
Matr.nr. 125i	504 m^2	191.520 kr.

Norðoyri		
Matr.nr. 25k	523 m^2	125.520 kr.
Matr.nr. 25h	523 m^2	125.520 kr.

Tilmæli:
Undir Klakki: mælt verður til, at fyrisitingin selur matr.nr. 125i á almennari sølu.
Norðoyri: mælt verður til, at fyrisitingin kann byrja søluna av matr.nr. 25h og 25k, tá ið omanfyri nevndu arbeiði eru avgreidd.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 13. september 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 15-07-2021.

Fíggjarnevndin 21. september 2021:
Nevndin tekur undir við UBN 13-09-2021.

Klaksvíkar Býráð 23. september 2021:
Tilmælið frá FíN 21-09-2021 einmælt samtykt.

148/21
17/00642-90 Møgulig yvirtøka av Syðradalsvegnum

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Syðradalsnevndin	01.09.2021	11/21
2 Ferðslunevndin	13.09.2021	31/21
3 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	13.09.2021	114/21
4 Tekniska Nevnd	15.09.2021	54/21
5 Fíggjarnevndin	21.09.2021	108/21
6 Klaksvíkar Býráð	23.09.2021	148/21

17/00642-90 Møgulig yvirtøka av Syðradalsvegnum

Frágreiðing um málið:
Vísandi til útstykkingarætlanina norðanfyri gjónna á Syðradali sendi kommunan Landsverk áheitan um at loyva, at frávík verður gjørt viðvíkjandi byggilinjuni (5,0 metrar) fram við landsvegnum. (Landsverk eigur vegin frá íbindingini í Knúksdali heilt til gjónna á Syðradali, og brúnna tvørtur um vegin).
Landsverk svarar kommununi við einum uppskoti um, at kommunan yvirtekur part av landsvegnum á Syðradali, frá gjónni og norður til íbindingina uml. 800 m.

Landsverk upplýsir, at vegurin hevur ikki týdning sum landsvegur longur og endar eisini á Syrðadali (ella við øðrum orðum, so er landsvegurin ikki gjøgnumgangandi frá Syðrdali til aðra bygd. Landsverk staðfestir, at talan er um ein síðuveg og ikki ein høvuðsveg.
Landsverk sigur víðari, at um so er, at kommunan yvirtekur vegin, so fær hon fult ræði á honum og kann tí sjálv avgera, hvussu bygt verður í bygdini.
Upplýst verður, at svarið frá Landsverk kemur eitt sindur óvart á kommununa, tí kommunan hevur ikki umhugsað møguleikan fyri yvirtøku av øllum vegateininum (800 metrar). Kommunan sókti bert um eitt frávik frá byggilinjuni, soleiðis at byggjast kann 5,0 metrar frá landsvegnum.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin.
Løgtingslóg nr. 51 frá 25. juli 1972 um landsvegir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 18 frá 8. mai 2008.
Kunngerð nr. 13 frá 26. februar 2007 um landsvegaskrá. Fyri Kalsoy er galdandi:
§ 8. Frá samferðsluhavnini á **Syðradali** eftir niðara vegi um **Húsar** til parkeringsøkið við skúlan á **Trøllanesi** við hesum teymum:
1) Til gjónna á **Syðradali**.
2) Brúnna um Áargil undir Brekku í **Mikladali**.

Fíggjarligar avleiðingar:

Vanliga er tað soleiðis, at kommunan yvirtekur vegir frá Landsverk uttan gjald, og tí verður talan um ein árligan rakstrarkostnað fyri at halda vegin og at skipa fyri vetrarhaldi, um kommunan velur at yvirtaka vegin.
Árligur rakstrarkostnaður kann setast til 350 kr./m = kr. 280.000,-
Árligur kostnaður fyri vetrarhald kann metast til (30 kr./m) = kr. 24.000,- (eftir takstinum hjá LV).
Sambært omanfyri standandi verður neyðugt við einari øktari avseting á fíggjarætlanini upp á góðar 300 tkr., um so er, at kommunan yvirtekur vegin.

Vegurin sær út til at vera í góðum standi, og tí skuldi ikki verið neyðugt við stórum umvælingum av vegnum komandi árini.

Tilmæli:
Við hesum verður málið lagt fyri allar viðkomandi nevndir og býráð til støðutakan:

1) Spurningurin eitt er um kommunan skal halda fast við umsóknina um frávík frá landsvega-byggilinjuni á Syðradali?
2) Spurningurin tvey er eitt nýtt uppskot til Landsverk um at kommunan yvirtekur tann partin av vegnum sum liggur innan fyri byggisamtyktina hjá kommununi – umleið 150 metrar.
3) Spurningur trý er um kommunan skal yvirtaka Syðradalsvegin soleiðis sum Landsverk skjýtur upp.

Fyrisitingin kann viðmæla, at tikið verður undir við pkt. 2.

Syðradalsnevndin 1. september 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum um yvirtøku av landsvegnum frá gjónni til rulluportrið við bøgarðin, o.u. 130 metrar.

Ferðslunevndin 13. september 2021:
Nevndin tekur undir við Syðradalsnevndini 01-09-2021.

Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 13. september 2021:
Nevndin tekur undir við FeN 13-09-2021.

Tekniska Nevnd 15. september 2021:
Nevndin tekur undir við UBN 13-09-2021.

Fíggjarnevndin 21. september 2021:
Nevndin tekur undir við TN 15-09-2021.

Klaksvíkar Býráð 23. september 2021:
Tilmælið frá FíN 21-09-2021 einmælt samtykt.

149/21
20/01227-24 Vetrarhaldið í 2021 - serlig avbjóðing – *eykajáttan, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Tekniska Nevnd	15.09.2021	52/21
2 Fíggjarnevndin	21.09.2021	106/21
3 Klaksvíkar Býráð	23.09.2021	149/21
4 Klaksvíkar Býráð	28.10.2021	

20/01227-24 Vetrarhaldið í 2021 - serlig avbjóðing

Frágreiðing um málið:
Vetrarhaldið fyrst í árinum (2021) hevur verið ein serlig avbjóðing hjá kommununi, og tí hevur býráðið í árinum samtykt eina eykajáttan upp á 200 tkr.

Kavaruddingin, grevstur, lastbilaflutningur av kava og salting førdi til, at eykajáttanin rakk ikki til, og nú er eitt staðfest yvirtrekk upp á 460 tkr.

Kavin við frostveðri lá óvanliga leingi, og tí varð avgjørt at fremja eitt størri ruddingararbeiði, har nógvar gongubreytir eisini vórðu grivnar, og kavin fluttur burtur við lastbilum.

Undir fyrru viðgerðini av málinum í mars og apríl 2021 gjørdi fyrisitingin vart við, at ikki kundi roknast við, at vetrarhaldið var yvirstaðið, og tí bleiv helst neyðugt við størri játtan.

Lógargrundarlag:
Kommunufulltrúin

Fíggjarligar avleiðingar:
Øll játtanin uppá 923 tkr. er brúkt, og yvirtrekkið er 460 tkr. Um hugt verður eftir vetrarhaldinum seinastu árini, so kann tørvurin fyri meirjáttan lættliga gerast einar 660 tkr., tí ofta er nýtslan í árinum einar 200 tkr. frá oktober til og við desember.

Tilmæli:
Við hesum verður málið lagt fyri TN og FíN til viðgerðar/støðutakan.

Upplýst verður, at tað er bert innan kontuna *Vegir Asfalteringsviðlíkhald*, at peningurin kann finnast, um yvirtrekkið skal avgreiðast innan raksturin hjá tekniska økinum. Um hetta verður samtykt, so er avleiðingin tann, at bráðfeingis asfalteringsarbeiði má útsetast. Fyrisitingin vónar tí, at málið verður loyst við einari eykajáttan uppá 660 tkr. til kavarudding.

Tekniska Nevnd 15. september 2021:
Nevndin tekur undir við at veita eina eykajáttan av *tøkum peningi* áljóðandi kr. 660 tkr.

Fíggjarnevndin 21. september 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá TN 15-09-2021.

Klaksvíkar Býráð 23. september 2021:
Tilmælið frá FíN 21-09-2021 einmælt samtykt.

150/21
21/00754-1 Rakstrarstaðið "Integratión" flytast frá kontubólki 1 til kontubólk 2 – *seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
2 Trivnaðarnevndin Børn og Ung	15.06.2021	37/21
3 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir	15.06.2021	26/21
4 Fíggjarnevndin	22.06.2021	92/21
5 Integratiónsnevndin	17.08.2021	5/21
6 Klaksvíkar Býráð	24.06.2021	114/21
7 Klaksvíkar Býráð	23.09.2021	150/21

21/00754-1 Rakstrarstaðið "Integratión" flytast frá kontubólki 1 til kontubólk 2

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 24. juni 2021.

Trivnaðarnevndin Børn og Ung 15. juni 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagfest 4. juni 2021.

Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 15. juni 2021:
Nevndin tekur undir við Trivnaðarnevndini B&U, dagfest 15. juni 2021.

Fíggjarnevndin 22. juni 2021:
Nevndin tekur undir við E&B 15-06-2021.

Klaksvíkar Býráð 24. juni 2021:
Tilmælið frá FíN 22-06-2021 einmælt samtykt.

Integratiónsnevndin 17. august 2021:
Nevndin tekur undir við Býráðnum, dagfest 22.06.2021.

Klaksvíkar Býráð 23. september 2021:
Tilmælið frá BýR 24-06-2021 einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

151/21
21/00755-4 Ábøtur á ognirnar hjá Norðoya Fornminnasavni 2021 – *flyting millum kontur, seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.
1 Mentanarnevndin	15.06.2021	51/21
2 Fíggjarnevndin	22.06.2021	84/21
3 Klaksvíkar Býráð	24.06.2021	123/21
4 Klaksvíkar Býráð	23.09.2021	151/21

21/00755-4 Ábøtur á ognirnar hjá Norðoya Fornminnasavni 2021 (flyting millum kontur)

Frágreiðing um málið:
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum 24. juni 2021.

Mentanarnevndin 15. juni 2021:
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 05-06-2021.

Fíggjarnevndin 22. juni 2021:
Ein meiriluti, KHJ, ASJ og OáL, tekur undir við MeN 15-06-2021.
Ein minniluti, JS og TJL, tekur undir við tilmælinum men mælir til, at peningurin verður fluttur frá *fastognum*.

Klaksvíkar Býráð 24. juni 2021:
Atkvøtt varð um minnilutatilmælið í FíN 22-06-2021; tað fall við 2 atkvøðum fyri (JS og TJL) og 7 atkvøðum ímóti (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP og ASB). ÓML og SVJ atkvøddu ikki.

Síðani varð atkvøtt um meirilutatilmælið frá FíN 22-06-2021; tað varð samtykt við 10 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP, ASB, ÓML, TJL og SVJ) og ongari ímóti. JS atkvøddi ikki.

Klaksvíkar Býráð 23. september 2021:
Atkvøtt varð um tilmælið frá BýR 24-06-2021; tað varð einmælt samtykt.

FRAMMANFYRI STANDANDI MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI

152/21
21/00915-3 Umsókn um leigugrund á havnalagi

153/21
21/00725-3 Umsókn um keyp av lendi

154/21
21/01048-1 Umsókn um meirøki

Fundurin lokin kl. 20:15